**Túrfrágreiðing - Magnus Heinason: Svartkjaftur sunnanfyri, túrur 1010, 31/3-14/4 2010**

**Fólk frá HAV:** Jan Arge Jacobsen, Ebba Mortensen og Mourits Mohr Joensen

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** At kanna nøgdirnar av svartkjafti sunnan fyri Føroyar og í norðara parti av gýtingarøkinum. Ekkókanningin er partur av felagskanningunum av svartkjafti, skipaðar undir ICES "Planning Group on Northeast Atlantic Pelagic Ecosystem Surveys" (PGNAPES), saman við skipum úr Noregi (1), ES (2) og Russlandi (1).

**Reiðskapur:** Svartkjaftatrol (flótitrol), CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið var beinleiðis suðureftir á í ES sjógv, har *Magnus Heinason* gjørdi kanningar saman við írska rannsóknarskipinum *Celtic Explorer* í norðara parti av ES økinum og sunnara parti av føroyska økinum (**Mynd 1**).

Hita- og saltmátingar vórðu tiknar við CTD frá vatnskorpuni niður á botn, ella niður á 1000 m, um botndýpið var djúpari enn 1000 m. Ætikanningar vóru gjørdar við einum WP2-planktonglúpi frá vatnskorpuni niður á 200 m dýpi.

Svartkjaftur

Fyribilsúrslitini frá *Magnus Heinasyni* benda á, at nógv minni av svartkjafti er til í ár enn undanfarnu árini. Svartkjafturin stóð mest sum bara fram við hellingini eystanfyri móti Skotlandi. Hóast lítlu nøgdirnar av vaksnum fiski, so vóru góð tekin at síggja í kanningunum í ár, nevniliga at smáur svartkjaftur um 22 cm til støddar var fingin í norðara partinum av kannaða økinum, millum bankarnar sunnan fyri Føroyar. Talan er um tvey ára gamlan svartkjafti, ella 2008 árgangin. So er bert at vóna, at hesin árgangurin er góður, og sleppur at nøra um stovnin. Kanningarnar seinnu árini hava víst, at sera lítið er komið undan frá árgangunum í 2005-2007.

Ekkóskriftin av svartkjafti er víst í **Mynd 2** og **3**. Nógv minni var at síggja í ár í mun til í fjør, og er tað serliga økini úti á og í vestara parti av kannaða økinum, at svartkjafturin var burtur. Svartkjafturin stóð á 400-500 m dýpi, har hann vanliga plagar a standa. Samlaða nøgdin av svartkjafti í gýtingarøkinum verður roknað út á fundi í Bergen (21-23 apríl), har tølini frá øllum fimm skipunum vera við.

Longdarbýtið av svartkjafti er víst í **Mynd 4**. Miðallongdin í kannaða økinum liggur um 29 cm og miðalvektin um 148 g, men hesi tølini siga ikki so nógv, av tí at talan er um tveir toppar í longdarbýtinum, ein um 22 cm (2 ára gamal svartkjaftur) og so ein um 30 cm, ið er eldri fiskur (5-8 ára gamal svartkjaftur, **Mynd 5**). Svartkjafturin var enn ikki komin norður móti føroyskum øki, og er kanska seinni á veg norðureftir enn undanfarin ár.

Makrelur

Eingin makrelur var fingin á túrinum í ár.

Lakssild og prikkafiskur

Nógv av lakssild var at síggja sum smáar torvur ella sum ein samanhangandi lind frá vatnskorpuni um náttina og niður á 300 m um dagin. Í fjør var eisini fitt at síggja av lakssild.

Undir lakssildini á 300-450 m dýpi stóð prikkafiskur, og eisini her var nógv til, men prikkafiskurin var meira spjaddur og sást sum støv á ekkóskriftini. Undir prikkafiskinum stóð svartkjafturin, har hann vanliga plagar a standa.

Silvurkalvi

Eingin silvurkalvi var fingin í ár, eins og í fjør. Í 2007 og 2008 var nógvur silvurkalvi at fáa, men her er ein broyting hend seinastu tvey árini, har lítið hevur verið at sæð.

Æti

Nógv krill var at síggja í mestsum øllum økinum á 400-700 metra dýpi, meðan sera lítið av æti var í ovaru løgunum (frá vatnskorpuni og niður á 200 m).

Hydrografi

Hitin í vatnskorpuni er vístur í **Mynd 5**.

**Sýnistøka:** Trolað varð javnan fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum, og 463 nytrur til aldursgreining av svartkjafti vóru tiknar av veiðuni, umframt 104 magar til at kanna føðina hjá svartkjafti.

Jan Arge Jacobsen

*Magnus Heinason* 13/4 2010




**Mynd 1.** Siglingarleiðin (svartar strikur) og CTD støðir (gulir sirklar) hjá *Magnus Heinasyni* á svartkjaftatúrinum 1010, 31/3-14/4 2010.




**Mynd 2.** Ekkóvirðir av svartkjafti ($s_A$ mm/nm$^2$) sunnan fyri Føroyar á túri 1010, 31/3-14/4 2010. Nøgdin er víst sum sirklar, har støddin á sirklinum vísir, hvussu nógv av svartkjafti stóð undir skipinum.




**Mynd 3.** Ekkóvirðir av svartkjafti pr. hagtalspunt (0.5x1 gradir) sunnan fyri Føroyar á túri 1010, 31/3-14/4 2010.




**Mynd 4.** Longdarbýti av svartkjafti í føroyskum øki og norðara parti av ES økinum í apríl 2010.




**Mynd 5.** Aldursbýti av svartkjafti í føroyskum øki og norðara parti av ES økinum í apríl 2010.




**Mynd 5.** Hitin (°C) í vatnskorpuni á túri 1010, 31/3-14/4 2010.